ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Ískoyti hjá Føroya Landsstýri til 2. og 3. frágreiðing hjá Danmark til ST-sáttmálan um rættindi einstaklinga, ið bera brek**

## Art. 1-4

Viðvíkjandi innliman í føroyska lóggávu av Sáttmálanum um rættindi einstaklinga, ið bera brek (eftir hetta: Sáttmálin), hevur danska løgmálaráðið gjørt vart við, at innliman kann hava við sær eina skeiklan av valdsbýtinum millum dømandi og lóggevandi valdið. Løgmálaráðið hevur harafturat víst á, at hóast Sáttmálin ikki er innlimaður, er Sáttmálin viðkomandi rættarkelda í Danmark. Føroya Landsstýri tekur undir við hesum sjónarmiðum, og í løtuni eru tí ongar ætlanir um at innlima Sáttmálan í føroyska lóggávu.

Arbeitt verður tó áhaldandi við at menna allar tænastur og veitingar, ið viðvirka til, at persónar, ið bera brek, kunnu luttaka á jøvnum føti við øll onnur í samfelagnum. Í 2017 varð ein tænastupolitikkur gjørdur á almannaøkinum, sum meginfelag teirra, ið bera brek, MEGD, umframt m.a. áhugafeløgini Sinnisbati og Javni, hava verið við til at orðað. Tænastupolitikkurin ásetir meginreglurnar, sum tænasturnar frameftir skulu skipast og veitast eftir. Úrslitið av tænastupolitikkinum er ein vælferðarlógarpakki – grundaður á brekpolitisku meginreglur Sáttmálans um kompensatión, javnviðgerð, geiraábyrgd og samhaldsfesti. Vælferðarlógarpakkin verður lagdur fyri Føroya Løgting í næstum.

Viðvíkjandi einari brekpolitiskari virkisætlan váttar samgonguskjalið hjá landsstýrinum frá 14. september 2019, at ein slík virkisætlan skal gerast fyri Føroyar. Arbeiðið er farið í gongd, og mett verður, at ein brekpolitisk virkisætlanin fyri Føroyar kann verða liðug innan 2021.

## Art. 5

Føroysk lóggáva ásetir ikki, at vantandi bústaðamøguleikar hjá persónum, ið bera brek, er at meta sum mismunur. Føroya Landsstýri viðurkennir tó rættin hjá teimum, ið bera brek, til fjølbroyttar bústaðamøguleikar á jøvnum føti við øll onnur. Hetta kemur m.a. til sjóndar í Bústaðapolitikki Landsins, ið leggur dent á, at bústaðamarknaðurin skal rúma øllum – eisini teimum, ið bera brek.

Tað sama er galdandi fyri atkomuviðurskifti yvirhøvur; lóggávan ásetir ikki, at vantandi atkoma er at meta sum mismunur, men arbeitt verður støðugt við at betra um atkomumøguleikarnar hjá teimum, ið bera brek.

Løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 bannar mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki. Kærur um brot á løgtingslógina verða viðgjørdar av Javnstøðunevndini. Tá nevndin viðger kærur um brot á løgtingslógina, skal ein persónur umboðandi MEGD luttaka undir viðgerðini. Í løtuni eru ongar ítøkiligar ætlanir um at seta í gildi eina breiðari anti-diskriminatiónslóg at banna mismuni á øllum økjum orsakað av breki.

**Art. 6.**

Saman við Nordisk Velfærdscenter skipaði Almannamálaráðið í 2017 fyri ráðstevnuni, Bryt Tabut. Ráðstevnan varpaði ljós á kynslívið hjá persónum, ið bera brek, umframt kynsligan ágang móti persónum, ið bera brek. Fyrra dagin varð evnið lýst í einum norðurlendskum høpi, meðan seinni dagurin snúði seg um føroysk viðurskifti.

**Art. 7**

Arbeitt verður miðvíst og áhaldandi við at menna og seta í verk átøk fyri at hjálpa børnum og ungum, ið bera brek. Í Føroyum eru fleiri almennar skipanir, ið hava sum endamál at tryggja børnum, ið bera brek, síni rættindi sambært Sáttmálanum. Nevnast kann heilsusystraskipanin (Gigni), ráðgeving til foreldur, skúlatilboð, frítíðartilboð, umlætting til foreldur umframt ymiskar aðrar stuðulsskipanir.

“Tann góða tilgongdin”, ein tvørgeiraligur og tvørfakligur samstarvsleistur til familjur, ið hava børn við autismu, er partur av samgonguskjalinum. Ætlanin er, at hesin leistur skal víðkast til at fevna um allar familjur, ið hava børn við breki. Partur av hesum snýr seg um at geva familjum, ið hava barn við breki, málrættaða og dygdargóða ráðgeving á høgum fakligum stigi.

Nevnast kann harafturat álitið um sálarliga heilsu frá 2018, har tað m.a. verður mælt til at arbeiða fram ímóti, at børn og ung fáa betri fyritreytir fyri góðari sálarheilsu.

**Art. 8**

Ein av høvuðsendamálunum við samskipandi eindini, ið varð sett á stovn á vári 2019, er at skapa tilvitsku innanhýsis í føroysku stjórnarráðunum um skyldur Føroya sambært Sáttmálanum.

Sambært rundskrivinum um lógarsmíð skal eitt lógaruppskot lýsa, hvussu lógaruppskotið samsvarar við Sáttmálan. Í nógvum førum kann vera trupult at meta um, hvørjar avleiðingarnar av einum lógaruppskoti verða. Stjórnarskúlin, ið skipar fyri skeiðvirksemi fyri føroysku stjórnarráðini, hevur tí í heyst, í samstarvið við MEGD, skipað fyri skeiði, har endamálið var at betra um førleikarnar hjá starvsfólkum í stjórnarráðunum at meta um, hvussu eitt lógaruppskot samsvarar við skyldur Føroya sambært Sáttmálanum.

**Art. 9**

Sambært samgonguskjalinum skulu atkomuviðurskifti á útoyggj betrast, eins og umstøðurnar hjá rørslutarnaðum í samferðsluni sum heild skulu raðfestast. Strandfaraskip Landsins (SSL) varðar av ferðaflutninginum kring landið – eisini sjóvegis millum oyggjarnar.

Í 2019 varð løgtingslóg um fólka- og farmaflutning broytt við tí endamáli at fáa lyftur í allar bussar, ið koyra millum bygdirnar í Føroyum. Sama ár varð bussleiðin sett í alment útboð aftur, og í hesum sambandi vórðu krøv sett til atkomumøguleikar hjá persónum, ið bera brek. Nýggi sáttmálin ásetir tískil, at allir bussar hjá SSL frameftir skulu hava lyftu soleiðis, at persónar við breki hava sama møguleika at nýta almennu busstænasturnar sum øll onnur. Hetta er eitt stórt framstig, tí árini frammanundan hava nærum eingir bussar hjá SSL havt lyftu.

SSL hevur eisini ferjur, ið tryggja eitt gott infrakervi millum meginlandið og útoyggjar. Flestu skipini eru tó gomul og hava onga lyftu. Talan er um lítlar ferjur, har tað ikki er møguleiki fyri at seta lyftu í. So hvørt sum skipini verða skift út, verða tey tó bygd eftir galdandi krøvum til lyftur o.a. soleiðis, at øll á jøvnum føti kunnu ferðast við SSL.

Viðvíkjandi talgildari atkomu arbeiðir Føroya Landsstýri í løtuni við at menna ein felags tænastuportal, ið skal hava atkomuligt snið sambært altjóða standardinum WCAG2. Verkætlanin, sum stovnurin "Talgildu Føroyar" stendur á odda fyri, er væl áleiðis, og í 2020 verður tað eftir ætlan byrjað at knýta tænastur hjá stovnum o.ø. í portalin. Tænasturnar fara tá at fylgja áður nevnda altjóða standardi.

**Art. 14.**

Í frágreiðingini frá 2011 vísti Føroya Landsstýri á, at verandi reglur um tvingsil innan sosiala økið vóru spjaddar og sum heild ikki nøktandi. Partur av vælferðarlógarpakkanum, sum í næstum verður lagdur fyri Føroya Løgting, er uppskotið um eina tvingsilslóg. Løgtingslógaruppskotið skipar viðurskiftini um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin og er galdandi fyri persónar, ið fáa tænastur sambært komandi vælferðarlóg, løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., og partvís eisini barnaverndarlógini.

Verður løgtingslógaruppskotið samtykt eins og væntað, er hetta at meta sum eitt stórt framstig fyri rættartrygdina hjá teimum, ið eru fyri  tvingsilsinntrivum.

**Art. 19**

Bústaðapolitikkur Landsins vísir til art. 19 í Sáttmálanum og ásetir, at persónar, ið bera brek, hava rætt til ein hóskandi bústað á jøvnum føti við øll onnur. Persónar við breki skulu sostatt ikki vera noyddir til at búgva í serligum bústøðum. Yvirskipað skilir bústaðapolitikkurin millum røktarbústaðir, sambýlir og búfelagsskapir.

Røktarbústaðir eru ætlaðir persónum, ið hava tørv á varandi røkt og støðugari hjáveru. Sambýlir eru sermerkt við sjálvstøðugum íbúðum, felagshøli og felags virksemi og felagsskapi út yvir vanligt grannalag, umframt møguligari røkt og viðgerð. Búfelagsskapir eru sermerktir við samanbygdum ella tættliggjandi sjálvstøðugum íbúðum við egnari inngongd og møguligum felagshøli. Búfelagsskapir eru ætlaðir persónum, sum ikki hava eins stóran tørv á sosialpedagogiskari hjá og vegleiðing sum fólk á sambýlum.

Miðað verður altíð eftir, at ein persónur, ið megnar at liva í einum búfelagsskapi, ikki skal noyðast at búgva í einum sambýli, eins og ein persónur, ið megnar at liva á einum sambýli, ikki skal noyðast at liva í einum røktarbústaði o.s.fr.

Síðani 2013 er fólkatalið í Føroyum hækkað við umleið 7 %. Føroyski bústaðamarknaðurin er sum heild undir trýsti, og hetta merkist eisini á eftirspurninginum eftir vardum bústøðum. Síðani 2011 er talið av vardum bústøðum økt við 100 eindum. Sambært samgonguskjalinum hjá Føroya Landsstýri skal ferð setast á bygging av vardum bústøðum. Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin í bústaðamálum hevur sett ein arbeiðsbólk við breiðari umboðan frá almenna og privata geiranum at kanna, hvussu avbjóðingarnar á bústaðaøkinum best kunnu loysast. Væntast kann, at arbeiðsbólkurin, sum eisini skal taka støðu til vardar bústaðir, kemur við tilmæli sínum á vári 2020.

Síðani stovnanina í 2012, hevur almenna bústaðafelagið útvegað 333 leigubústaðir. Almannaverkið hevur ávísingarrætt til 5. hvørja íbúð hjá Bústøðum. Íbúðirnar verða tillutaðar borgarum, sum annaðhvørt likamliga ella sálarliga hava varandi skert virkisføri, men sum hóast hetta megna at liva sjálvstøðugt í egnum bústaði.

Viðvíkjandi stuðli til einstaklingar, eru fleiri stuðulsskipanir, ið kunnu bøta um møguleikarnar hjá teimum, ið bera brek, at liva eitt sjálvstøðugt lív. T.d. ber tað umvegis Almannaverkið til at fáa hjálparráð, hjálpitól, stuðul til avlamisbil og stuðul til bústaðarbroytingar.

**Art. 24**

Mentamálaráðið hevur leingi arbeitt miðvíst við at skapa eitt meira fevnandi umhvørvi í føroyska fólkaskúlanum og á ungdómsútbúgvingunum sum heild. Síðani 1997 hevur fólkaskúlalógin staðfest beinleiðis, at føroyski fólkaskúlin er fyri øll.

Seinastu árini hevur Mentamálaráðið saman við skúlunum og PPR arbeitt við at uppkvalificera neyðugan stuðul soleiðis, at øll børn og ung fáa eitt gott og kvalifiserað skúlatilboð í einum fevnandi skúlaumhvørvi. Stuðulsskipanir eru lagaðar til eftir tilmælum frá einum arbeiðsbólki, settur av Mentamálaráðnum. Arbeiðsbólkurin hevur víst beinleiðis á, hvussu stóran týdning ein fevnandi føroyskur fólkaskúli hevur.

Fleiri stuðulsskipanir, ið skulu tryggja inklusión, eru komnar afturat teimum verandi, eins og neyðugar bygnaðarbroytingar eru gjøgnumførdar. Á ungdomsútbúgvingunum eru stovnað sertilboð – sonevndar “Serbreytir” og “Serflokkar”.

**Art. 25.**

Í Føroyum hava øll rætt til ókeypis viðgerð í sjúkrahúsverkinum. Tannrøkt hjá børnum og ungum (undir 18 ár) er somuleiðis ókeypis, meðan tannrøkt hjá vaksnum partvís er fevnd av føroysku heilsutrygdarskipanini.

Í Føroyum eru 3 sjúkrahús við tilsamans 191 seingjarplássum. Landssjúkrahúsið liggur í Tórshavn, Klaksvíkar Sjúkrahús í Klaksvík og Suðuroyar Sjúkrahús á Tvøroyri. Sjúkrahúsini hava fleiri sergreinir. Landssjúkrahúsið hevur ein skurðdepil, ein medisinskan depil, ein psykiatriskan depil, ein diagnostiskan depil, ein bráðdepil og ein fyrisitingardepil. Harumframt hevur sjúkrahúsið tilknýtt konsulentar í neyðugum sergreinum. Í sjúkrahúsverkinum eru 55 serlæknar, 54 læknar, 405 sjúkrarøktarfrøðingar, 32 fysioterapeutar og ergoterapeutar, 27 jarðarmøður og 185 onnur heilsustarvsfólk. Harafturat verða sjúklingar ávístir til sjúkrahúsviðgerð í Danmark og øðrum londum, um viðgerðin ikki fæst í Føroyum.

Í Føroyum verður nógv gjørt fyri at betra um liviumstøðurnar hjá persónum, ið bera brek, soleiðis, at hesi kunnu liva longur og sum heild kunnu fáa eitt betri lív. Eingin yvirskipaður heilsupolitikkur er fyri brekøkið, men fleiri álit eru gjørd á ymsum økjum, sum hvør sær seta út í kortið, hvussu liviumstøður hjá persónum, ið bera brek, kunnu betrast. Nevnast kann heildarætlanin fyri diabetesviðgerð, ið varð latin landsstýrismanninum í 2013; menningarætlanin fyri sjúkrahúsverkið og tilmælið um samskipaða endurvenjing, ið varð handað í 2016; heildarætlanin fyri sálarliga heilsu, ið varð handað í 2018 og ætlanin um persónlagað medisin, ið varð handað í 2019. Alt ætlanir, ið koma við tilmælum á heilsuøkinum um, hvussu vit betra um liviumstøðurnar hjá persónum, ið bera brek.

Viðvíkjandi atgongd til screening fyri lívmóðurhálskrabba fáa kvinnur, ið bera brek, innkalling á jøvnum føti við aðrar kvinnur. Kvinnan finnur saman við kommunulækna sínum útav, nær og hvar kanningin verður gjørd. Kvinnur, ið bera brek, fáa boð um kanningarúrslitið á sama hátt sum aðrar kvinnur.

Í Primergeiranum veita heilsusystrar ungum ókeypis ráðgeving og upplýsing um kynsliga heilsurøkt og nøringarheilsurøkt. Eisini veita heilsusystrar serliga fosturtøkuráðgeving til ung, um tørvur er á tí, og møguleiki er eisini fyri samtalu og ráðgeving um heilsufaklig, sosial og sálarlig viðurskifti. Ung, ið bera brek, fáa ráðgeving um kynsliga heilsurøkt og nøringarheilsurøkt á jøvnum føti við onnur ung.

Í Føroyum verður stuðul til hoyritól veittur persónum, sum hava varandi niðursetta hoyrn og eru vístir til hoyritólaviðgerð av serlækna í oyra-, nøs- og hálssjúkum. Stuðul verður veittur, um hoyritólið er neyðugt fyri, at brúkarin kann vera í vinnu, um hoyritólið munandi bøtir um hoyrnina hjá brúkaranum, ella um hoyritólið lættir munandi um í gerandisdegnum hjá brúkaranum. Stuðul verður veittur til talgild hoyritól, tinnitusmaskur, hørat, oyrnaproppar, hoyrivernd og fjarstýrarar.

Um tað er neyðugt hjá einum sjúklingi at verða fluttur við sjúkrabili ella øðrum flutningsfari frá sínum bústaði til eitt viðgerðarstað í Føroyum, verður hetta goldið av Sjúkrahúsverkinum. Flutningur skal fara fram við tí eftir umstøðunum bíligasta, fullgóða flutningsfarinum. Umframt hetta fær ein sjúklingur eisini goldið flutning til viðgerð uttanlands. Um sjúklingurin, annaðhvørt vegna lívshóttandi sjúku, ella vegna likamligt, sálarligt ella sosialt ófullføri, ikki er førur fyri at ferðast ella uppihalda sær einsamallur undir viðgerð uttanlands, kann sjúkrahúsverkið eisini rinda fyri, at ein fylgjari ferðast við sjúklinginum til og frá viðgerðarstaðnum.

Viðvíkjandi atkomu til almennar bygningar í Føroyum, er ásett í kunngerð, at atkomu- og tilkoyringarøkir skulu gerast soleiðis, at persónar við rørslutarni kunnu nýta bygningin, hetta soleiðis, at persónar við rørslutarni skulu hava størri frælsi, rásarúm og trygd. Almennir bygningar skulu gerast og innrættast soleiðis, at teir kunnu nýtast av øllum á ein nøktandi hátt við atliti at trygd, heilsu, atkomuviðurskiftum, viðlíkahaldi og reinhaldi. Nøktandi atkoma og atkomuviðurskifti fyri persónar við rørslutarni merkir, at persónar, ið eru rørslutarnaðir, kunnu javnmetast við onnur og hava natúrliga atgongd til bygningar ætlaðir almenninginum, umhvørvið kring bygningin og at ferðast í bygninginum. Somuleiðis skulu hesi menniskju hava somu atgongd til hurðartelefonir, tilkalliskipanir og annars allar hentleikar og tilboð, sum eru ætlað almenninginum.

**Art. 26.**

Sambært tænastupolitikkinum frá 2017 skulu allar tænastur, ið eru undir málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almannamálum, frameftir skipast við menning og endurmenning í huga. Hesar tænastur fevna m.a. um stuðulstænastur fyri børn og vaksin, bústaðatilboð, endurvenjingartænastu og virknistænastu.

Í vælferðarlógarpakkanum er ein røð av amboðum, ið stuðla undir, at persónar, ið bera brek, fáa tað lív, sum tey sjálv ynskja og megna. Uppskotið til vælferðarlóg inniheldur eisini heimild til at skipa nýggjar tænastur. M.a. verður viðlíkahaldsvenjing á fyrsta sinni lógarfest, og ætlanir eru um at fara undir at stovnseta tænastuna.

**Art. 29.**

Sambært føroysku vallógunum hava tey, ið eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógarinnar § 6, ikki valrætt. Henda áseting hevur heimild í § 3 í Stýrisskipanarlóg Føroya.

Í vallógunum hava borgarar tryggjaðan rætt til ta hjálp, sum teimum tørvar fyri at kunna útinna sín valrætt. Um persónur møtir til val og sigur frá, at hann ikki er førur fyri einsamallur at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, kann viðkomandi fáa hjálp til hetta frá tveimum av valstýrinum til hetta endamál tilnevndum persónum, ið eru undir tagnarskyldu. Blindur ella sjónveikur persónur kann tó krevja hjálp frá einum persóni, ið viðkomandi sjálvur vísir á. Um persónur er so mikið lamin, ella á annan hátt hevur so skert virkisføri, at hann er ikki førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann viðkomandi krevja, at atkvøðugreiðsla fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir av valstýrislimunum ella hjálparfólkunum vera hjástaddir og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.

Í atkvøðuhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistar vera uppsligin. Somuleiðis skal vera uppsligin ein vegleiðing fyri veljararnar um tey viðurskifti, ið hava størstan týdning fyri sjálvt valið. Harumframt er ein grafisk vegleiðing, sum á einfaldan og lætt skiljandi hátt lýsir, hvussu krossurin skal setast.

**Art. 31.**

Innan almannaøkið verða upplýsingar innsavnaðar ígjøgnum miðsavnaðu KT-skipanina á Almannaverkinum. Støddin á fyrisitingini hevur við sær, at Føroyar í nógvum førum ikki hava orku at framleiða hagtøl í sama mát sum størri lond. Orkan verður ofta nýtt til at framleiða ad hoc hagtøl, tá ið tørvurin uppstendur. Ætlanin er tó at byrja at uppgera meira reglulig hagtøl, eitt nú um talið av persónum, ið móttaka almannaveitingar og almannatænastur vegna brek.

**Art. 33.**

Samsvarandi art. 33, nr. 1 í Sáttmálanum varð ein samskipandi eind innan miðfyrisitingina sett á stovn á vári 2019. Í eindini sita umboð úr øllum stjórnarráðunum, umframt umboð úr Kommunufelagnum. Uppgávan hjá eindini er at tryggja eina miðvísa og samskipaða verksetan av Sáttmálanum í føroyska samfelagið. Ítøkiliga skal eindin evna til eina brekpolitiska virkisætlan (action plan) fyri Føroyar. Henda virkisætlan verður væntandi liðug innan 2021.

Nevndin hevur áður mælt Føroya Landsstýri til at seta á stovn eina mannarættindaeind at fremja og verja mannarættindini samsvarandi París-meginreglunum. Undanfarna landsstýri setti í 2016 ein arbeiðsbólk at koma við tilmæli um, hvussu ein mannarættindaeind kann verða skipað í Føroyum. Arbeiðsbólkurin handaði fyrrverandi landsstýrismanninum eina frágreiðing í mai 2017. Sambært frágreiðingini skal ein møgulig mannarættindaeind fylgja við og gera lýsingar av mannarættindastøðuni í landinum, ráðgeva myndugleikum og samstarva við stovnar, felagsskapir, skúlar, fróðskaparsetur o.o.

Arbeiðsbólkurin vísir í frágreiðingini á fýra verandi stovnar, ið kunnu røkja uppgávuna at hava eftirlit við mannarættindum í Føroyum: Løgtingsins Umboðsmaður, Føroya Kærustovnur, Fróðskaparsetur Føroya og Javnstøðunevndin. Fyrimunir og vansar eru við at leggja økið til hesar fýra stovnarnar,

men arbeiðsbólkurin metir allar verða egnaðar, um nøktandi fíggjarlig orka fylgir við, og lógargrundarlag er til staðar.

Í sambandi við, at ein arbeiðsbólkur er settur at eftirmeta Føroya Kærustovn, hevur bólkurin eisini fingið til uppgávu at koma við uppskoti um, hvussu ein mannarættindaeind, ið skal geva brekøkinum serligan ans, kann skipast innan karmarnar av Føroya Kærustovni. Arbeiðsbólkurin handar eftir ætlan sítt tilmæli til politisku skipanina á várið 2020. Eftir tað hevur Føroya Landsstýri væntandi eitt ítøkiligt uppskot til, hvussu ein mannarættindaeind kann skipast undir kørmunum av Kærustovninum.

MEGD hevur víst á, at tørvur er á einum talsfólki, ið kann hava óheft eftirlit við, at Sáttmálin verður hildin, og sambært samgonguskjalinum skal eitt slíkt talsfólk setast í starv. Enn er ikki avgjørt, hvussu farið verður fram víðari, men tað er ósannlíkt, at talan verður um tveir eftirlitsstovnar, og tískil verður helst bara farið víðari við øðrum av leistunum.

Hóast eingin mannarættindaeind er, eru í dag fleiri skipanir, sum verja persónar, ið bera brek. Í sambandi við starvssetan er ikki loyvt at gera mismun á umsøkjarum orsaka av breki. Tað sama er galdandi fyri uppsøgn, starvsflyting, starvsuppflyting og lønar- og setanartreytir. Um brot verður framt á hesar reglur, kunnu persónar, ið bera brek, kæra brotið til Javnstøðunevndina.

Um persónar, ið bera brek, ikki fáa tær veitingar, sum teir sambært lóggávuni hava rætt til, kunnu teir kæra henda órætt til almennar kærunevndir. Hesar eru Kærunevndin í almanna-, heilsu- og familjumálum og Psykiatrikærunevndin. Um borgarin fær viðhald frá einari almennari kærunevnd, skal myndugleikin, t.d. Almannaverkið, fylgja avgerðini hjá kærunevndini.

Viðvíkjandi atkomu til almennar bygningar í Føroyum er ásett í kunngerð, at atkomu- og tilkoyringarøkir skulu gerast soleiðis, at persónar við rørslutarni kunnu nýta bygningin. Um byggimyndugleikin tekur avgerðir, har persónar, ið bera brek, eru fyri órætti, kunnu hesar avgerðir kærast til Lendiskærunevndina. Lendiskærunevndin er ein almenn kærunevnd, ið tekur avgerð í m.a. byggimálum. Tá ið Lendiskærunevndin hevur tikið avgerð, skulu hesar avgerðir fylgjast av undirliggjandi myndugleika.

Umframt hetta er eisini møguligt hjá persónum, ið bera brek, at klaga til Løgtingsins Umboðsmann um teir t.d. hava fingið óvirðiliga viðferð frá almennum stovnum, ella um tey ikki fáa svar frá almennum myndugleika uppá ein fyrispurning vegna drúgva málsviðgerðartíð.